# k má tola kritikk



**Føroya mest umstrídda dómsnevnd í løtuni, Katrina í Geil, Katrin Bonde og Anna Mortensen høvdu ikki ivast í at tikið somu avgerð umaftur Tú kanst ikki geva eina 1.virðisløn, tí tað annars hevði verið synd, tá luttakarin nú hevði gjørt sær so nógvan ómak, halda tær**

> *Trupulleikin er nokk, at vit hava gjørt eina professionella meting av nøkrum, sum fólk vanliga knýta nógvar kenslur at*
> *Katrina í Geil*

> *Eftir mínum tykki er tað eins nógv dómsnevndin, sum her er offur fyri Jantelógini*
> *Anna Mortensen*

Júst hetta við uppgávuorðingini á ársins Gluggaglæmu hevur verið hornasteinurin í arbeiðinum hjá dómsnevndini. Kravið var, „við mentanarligum samleika og visjónum um framtíðina at flyta eyðkenni við klæðum føroyinganna inn í framtíðar klædnabúnar til føroyskar menn og kvinnur". At ongin av luttakaranum loysti hesa uppgávuna til fulnar, hevði náturliga við sær, at ongin 1. virðisløn kundi latast. Annars var ongin meining í at gera eina slíka uppgávuorðing og biðja professionell fólk meta um avrikini, halda tær tríggjar.

- Vit fingu ongantíð kravboð um, at 1., 2. og 3. virðisløn skuldu latast óansæð hvat. Um so var, kundu vit staðið í tí støðu, at tað til dømis bert komu tvey ella trý miðalhampa sett inn, sum øll skuldu hava hvør sína virðisløn. Um vit yvirhøvur skulu tosa um niðurgering í hesum sambandinum, so hevði tann støðan eftir mínum tykki verið ein dygg niðugering av fakinum og sera óvirðilig fyri luttakarar, sigur Katrina í Geil og leggur afturat

- Eg dugi veruliga ikki at síggja, hvør skuldu fingið gleði av eini virðisløn, sum bleiv latin, tí tað annars hevði verið synd, tá viðkomandi nú hevði gjørt sær so stóran ómak.

## Skump til glaðu amatørarnar

Men var tað nú neyðugt at vera so strangar fakliga, tá nú Gluggaglæma frá byrjan fyrst og fremst hevur verið eitt forum fyri glaðar amatørar?, spyr ein harmur kjakari á netinum.

Katrin Bonde ristir stillisliga við høvdinum.

- Eg skilji ikki rættiliga handan pástandin um, at Gluggaglæma er ein samling av glaðum amatørum. Møguliga var tað soleiðis, tað byrjaði, men tiltakið flutti seg rættiliga skjótt upp á eitt meir professionelt støði. Faktiskt høvdu helvtin av luttakararnum í hesi kappingini útbúgving innan fakið. Hinvegin, so hava glaðir amatørar eisini brúk fyri einum skumpi, so teir kunnu menna seg víðari

- Netupp! Tí skulu vit eisini ansa eftir, hvussu vit brúka hugtakið „glaðir amatørar". Um tað merkir, at vit ikki kunnu seta teimum krøv, so loyva vit teimum heldur ikki at koma upp eitt hægri støðið, sum tey kanska væl megna, um tey verða trýst eitt sindur, heldur Katrina í Geil, sum eisini er sannførd um, at uppgávan á ársins Gluggaglæmu væl kundi verið loyst av einum dugnaligum amatøri.

At tað ikki eydnaðist, merkir á ongan hátt at innkomnu avrikini vóru vánalig. Tvørturímóti, sigur Anna Mortensen

- Hvør sær vóru nógv av pløggunum ómetaliga áhugaverd. Eg hevði eisni glett meg til at framsýningin fór at enda við eini mótasýning, har ymsu pløggini blivu sett saman á ymsar aðrar mátar, tí har vóru so nógvar orginalar detaljur, sigur hon.

Katrin Bonde nikkar eldhugað.

- Ja, ímynda tær, um man setti buksurnar hjá nr. 2 saman við húgvuni hjá nr.3. Tað hevði verið ótrúliga spennandi ...

- Hasar reyð-strípútu buksurnar hjá nr. 2 fara heilt sikkurt at ganga á G! næsta ár. Tað eri eg vís í. Tær eru totalt London. Ongin hevur jú brúkt toyið til føroyska skjúrtið uppá handan mátan fyrr, sigur Katrina í Geil.

Eina løtu eru tær tríggjar heilt burtur í spentum práti um allar teir møguleikar, sum lógu goymdir í mongu pløggunum í kappingini.

- Tí er tað eisini so forferdiligt, at framsýningin bleiv tikin niður, og fólk nú ikki sleppa at síggja pløggini. Tað er synd fyri luttakararnar og spell fyri okkum, tí nú fáa okkara metingar heldur onki veruligt mótspæl, sigur Katrin Bonde.

## Eitt stig á leiðini

Hóast framsýningin læt aftur eftir bert fáum tímum, verður úrskurðurin á ársins Gluggaglæmu tó neyvan gloymdur í bræði. Millum fólk og á ymsum netstøðum hevur neyvan verið størri kjak um eina virðisløn, sum ongantíð varð latin. Serliga tykist mátin, hetta hendi, at níva fólk. Tað var nevniliga ikki, fyrr enn eftir at bæði 3. og 2. virðislønirnar vóru latnar, at frásøgumaðurin boðaði frá, at hann ongan bjævbjálva hevði við 1. virðislønini.

Men sambært dómsnevndini var hetta gjørt heilt tilvitað. Tað var netupp sera umráðandi fyri tær, at nummar 2 og 3 fingu allan tann heiður og alt tað uppmerksemi, sum tær og teirra avrik høvdu uppiborið.

- Um vit byrjaðu við at siga, at ongin 1. virðisløn bleiv latin, riskeraðu vit at standa við einum tómum Pakkhúsi, sum kundi oyðilagt alt fyri tær, sum fingu virðislønirnar, og tað vildu vit avgjørt ikki, sigur Anna Mortensen.

Hóast tær tríggjar sostatt høvdu varhuga av, at teirra úrskurður ikki fór at falla í góða jørð, hava tær framvegis ilt við at skilja, hví fólk tóku hetta so illa upp.

- Tað virkaði á fólki, sum um tað var lívið um at gera at fáa staðfest ein vinnara. Annars kundi alt vera líka mikið, tí so helt dómsnevndin nokk at alt var nakað skrambul. Men tað er ein stór misskiljing. Tað tykist sum fólk hava gloymt, at har varð latin ein 2. virðisløn og ein 3. virðisløn og tær eru so hjartaliga uppibornar, tí arbeiði var gott. Yvirhøvur hava allir luttakararnir lært nógv av tí, sum tey hava verið ígjøgnum fyri at skapa hesi settini og tað er ikki minni vinningur. Sæð í okkara eygum var hatta bara eitt stig á leiðini hjá eini røð av dugnaligum fólkum móti at gerast enn dugnaligari, staðfestir Katrina í Geil.

Myndir av pløggunum frá klædnakappingini á Gluggaglæmu síggjast millum annað á mótaportalinum www.kaos.fo